LM-099/2023

Fylgiskjal 72

Eiði 23.02.2024

Uttanríkis og Vinnumálaráðið

Hoyringssvar vegna hagastýrið í Suðurhelvt á Eiði. (Slættaratindi).

Sjálvt um tað er gleðiligt, at tað í lóg verður gjørt greitt, hvør eigur og ræður yvir høgunum í Føroyum, halda vit, at henda lóg rakar við síðurnar av.

Fyri tað fyrsta halda vit, at rætturin hjá Føroyingum at ganga í haga ikki skal tilskilast í einari ferðavinnulóg. Hetta er longu í ávísan mun lógarfest í lóg um "hegn og markfred" frá 1937. Tað er greitt, at § 3 í hesum uppskoti er meira víttfevnandi enn tann gamla lógin, tá tað kemur til rætt til at ganga í haga. Fyrr var tað bygdagøtur føroyingar kundu ganga eftir, nú er tað allastaðni í útgangsstøðinum. Tí er hetta lógaruppskot ein skerjing av teimum rættindum, sum vit eigarar hava havt. Vit meta ikki at lógin um "hegn og markfred" frá 1937 skal broytast orsaka av eini ferðavinnulóg.

Viðari sæst, at § 3 ikki er avmarkað til føroyingar, men øll í heiminum hava rætt til at ganga allastaðni uttangarðs. Turistar gjalda eitt gjald fyri hetta, føroyingar onki, og hetta skuldi givið einar 20 milliónir til býti millum bygdir, bøndur og kommunur.

Øllum kunnugt er Slættaratindur hægsta fjall í Føroyum, og tiskil populert hjá bæði føroyingum og turistum at ganga uppá. Visit Faroe Islands metir, at upp til 15.000 fólk fara uppá tindin árliga. Øll, sum hava verið har, vita at vøllurin er traðkaður niður, og rásir eru traðkaðar til, sum fólk í ávísan mun bruka. Ein traðka rás/gøta (ikki gomul bygdagøta) er longri uppi, sum eisini skal viðlíkahaldast. Við tað, at økið liggur so høgt, er tað sera viðbrekið. Lív í hesum hæddum er á markinum frammanundan, og klárar seg bara, um umstøðurnar annars eru optimalar. Hetta er artiskt klima. Granskarar hava greitt okkum frá, at økið, sum er niðurtraðkað ikki kemur seg aftur fyrr enn um fleiri ættarlið, so seint veksur haruppi. Stutt sagt, berur tindurin ikki so nógva ferðslu.

Vit halda, at tað ikki er rætt, at øll fólk í heiminum hava rætt til at ganga upp á Slættaratind og í tí sambandi oyðileggja lendið sum er har. Vit halda, at vit sum eigarar av einum øki eiga at hava rætt til at avmarka hvussu nógv fólk ganga har, og hvat tey ganga.

Til § 5. stk. 1, um vinnuliga ferðavinnu, er eitt sindur ógreitt hvat meinast við "samráð", tí tað einasta sum eigarin sambært tekstinum kann, er um tað er haruskjóting ella fjallgonga, so kann eigari sýta fyri, at fólk ganga í haganum, í hvussu so er vinnuliga. Vit kunnu eisini krevja eina standardavtalu, sum ongin veit hvat er.

Dømi er um, at 6 turistar keyptu sær ein túr á Slættaratind fyri kr. 9.000,-. ella kr. 1.500 hvør. Íroknað var bussur úr Havn og ein ferðaleiðari. Vit eigarar fingu onki av tí. Eftir § 5, kundi hetta hildið á (um ikki fjallgonga ella haruskjóting var, og um standardavtalan varð gjørd). Sum skilt á kunningarfundi í skúlanum við Streymin, so inniber standardavtalan ikki, at vit eigarar kunnu krevja pengar fyri, at onnur gera túrar uppá tindin, slíta lendið niður og samstundis banna um, hvi vit eigarar ikki viðlíkahalda gøtuna betri!

Vit halda, at serstakar perlur í Føroyum, har serliga nógv fólk ganga (her verður hugsað um uttangarðs, og Slættaratindur roknast óivað millum hesar), eiga at kunna skapa inntøku í sær sjálvum, so færri fólk gjalda fleiri pengar fyri at ganga upp á tindin. Møguleiki skal vera fyri, at atgongd til tindin er avmarkað í tíð og tali, og at allir túrar skulu gerast við ferðaleiðara, sum eigararnir skipa fyri. Aðrir ferðaleiðarar kunnu so í samráð við eigararnar eftir § 5, stk. 1, gera avtalu um at keypa pláss til at gera túrar, sum so fer av samlaða, av eigarunum staðfesta tali, av dagligum/vikuligum fremmandafólki, sum tindurin berur.

Standardavtalan í § 5, stk. 3 eigur sostatt at loyva okkum eigarum at gera avtalur, sum inniber gjald fyri at gera teir túrar vit ikki sjálvir gera. Hetta hevði eftir okkara meining verið ein skilabetri loysn.

Vegna Hagastýrið

Jóannes Mørkøre, formaður
Jógvan í Skorini, næstformaður